# Jana – eitt hjartabarn

**BÓKAUMMÆLI**

*Eyðun Joensen, sálarfrøðingur*



Næstseinasta mánaðarskiftið kom út forvitnislig bók og sum so helst hin fyrsta av sínum slagi í Føroyum.

Tað er Tórun Ellingsgaard, journalistur, sum so gjølla, hegnisliga og eymt hevur lýst lív og uppvøkstur hjá tí nú 40 ára gomlu og frá føðingini fjølbrekaðu Janu, einkardóttir teirra Helenu og Hanus Samuelsen í Hoyvík og einkarsystkin Óla Samró í Hollandi.

Talan er um grípandi, bersøgnan, hugvekjandi og samstundis væl frágingnan, sakligan lestur, sum fevnir um so mangt annað viðkomandi enn søguna um Janu, eldsálir, slóðbrótarar, umsorgan og ósvikaliga kærleika næstringanna.

Bókin lýsir nevnliga eisini væl søguna um tey menningartarnaðu í Føroyum og tey veldugu framtøk, sum ótroyttiligar eldsálir saman við Helenu og teimum hava framt ta seinastu hálvu øldina frá tí mannavondu og mangan tvingaðu forfjóning av menningartarnaðum føroyingum niður á Rødbygård fram til, at tað ikki longur gjørdist neyðugt at senda hesi børn við so skerdum førleikum burtur í fremmant land til fremmandar umstøður, øðrvísi tungumál og aðra siðvenju og mentan enn ta heimligu.

Og tá tú lesur hesa bók, ger tað ikki verri samstundis at hoyra Jógvan Arge lesa upp úr søguliga verkinum hjá Doris Hansen “Um hini”. Hesar báðar bøkur supplera sera væl hvørja aðra. Hin fyrra neyv søgugjøgnumgongd og henda seinra somuleiðis søga, men meira bygd upp um ítøkiligar mannalagnur og feskari aktualitet.

Bókin byrjar við tí truplu avbjóðing, tað er at muga ásanna sum annars spillfrísk familja at hava fingið fjølbrekað barn. Vit spyrja hví, men fáa einki svar, og eg veit frá mínum arbeiðslívi um illa ands- og/ella sinnisbrekað foreldur , bæði tvey, sum kortini bara hava fingið vælment børn.

Bókin lýsir øgiligar avbjóðingar hjá næstringum til menningartarnað og ber samsvarandi boð um at loysa úr lagdi og at bróta upp úr nýggjum hjá eini vanligari kjarnufamilju, sum í lívsins vónríka vári fær eitt so fjølbrekað barn sum Janu, og so eru tað eisini so mangar aðrar familjur í líknandi støðu og summar við enntá fleiri brekaðum børnum.

Bókin sigur søguna um familjunnar ómetaliga stríð og strev fyri egnar sakir, men eisini orku og yvirskot til at taka hendur saman við øðrum javnstillaðum at skora á avvarðandi myndugleikar í eini tíð, har samfelagið als ikki var gearað til at taka hond um brekað fólk og teirra avvarðandi. Bókin er eisini ein viðkomandi, um enn stundum bersøgin, partur av søguni um Javna, landsfelagsskapin andsbrekaðum at bata og ikki minst tað hjá Óla at vera einkarsystkin til eina so svárt brekaða lítlasystir, sum kom at fylla so nógv í teirra heimi og huga.

Higartil hava á føroyskum mest verið skrivaðar lívssøgur um búskaparlig stórmenni, og gott tað sama, men bókin um Janu er hópin øðrvísi bæði í skapi og innihaldi. Har eru eingi hagtøl um so og so nógvar mettaðar munnar, men bert tey trý smáu, stetlandi fetini, sum síðani tíverri skjótt svunnu burtur aftur fyri well.

Havi sjálvur í undirvísingarhøpi javnan skoytt hetta uppí, at sjálvt sera truplar avbjóðingar hjá summum menniskjum kunnu elva til víðskygni og aðra menning, kveikja orku, sum ein ikki visti av og annars geva lívinum nýtt og víðfevndari innihald.Slíkt er so lætt hjá okkum øðrum at siga , og eg fekk eisini eina ordans ábreiðslu frá avvarðandi í dýrastu neyð, tá eg einaferð hevði fyri munni, at vit í grundini høvdu brúk fyri brekðum meðmenniskjum fyri reiðiliga at fata og seta prís upp á fríska tilveru.

Tað hevur verið sagt, at tað var heppið, at tað vóru Hanus, Helena og Óli, sum gjørdust familja hjá Janu, síðani tey høvdu ella fingu orku til at taka sær av henni og síðani saman við øðrum skorða undir Javna, landsfelagið menningartarnaðum at frama.

Ikki tí, tað eru so mong onnur húski í líknandi støðu, og tí er bókin um Janu umframt eitt herðaklapp til hennara ein uppiborin viðurkenning til tey mongu onnur avvarðandi at fjølbrekaðum fólki, ein viðurkenning til almenn starvsfólk, sum royna sítt ítasta at stimbra og veita brekaðum sum mest av lívsdygd, ein viðurkenning til øll tey mongu í Javna umframt ein viðurkenning til almennu Føroyar, sum seinastu hálvu øldina hóast alt eru komnar so langt framá at veita eisini slíkum skerdum meðborgarum og teirra mannsømilig kor, hóast tað altíð verður at resta í.

Men tað dylist ikki fyri, at uttan frumpionerar, jarnbrot, gravkýr, buldosarar og aðrar eldsálir saman við hóvligum fólkum við hælin var ikki vunnið so langt framá menningartarnaðum at bata. Eisini hetta stendur í bókini, stundum í so bersøgið og privatkent, men tað ger bara bókina enn meira spennandi at lesa, umframt at tann fjølmenti og landsumfatandi Javnifelagsskapurin er dynamiskur heldur enn einstáttaður.

Ósemjur ella ei innanfelags? Eg havi í mínum embæti í 3o ár havt nógv samband við avvarðandi til menningartarnað fólk og skiftandi formenn og nevndir í Javna umframt verið uttanlands upp á landsins besta saman við øðrum embætisfólkum og fólki frá Javna og havi so ikki kunnað varnast annað úteftir enn tryggan samróður fyri felags søk.

Tá eg tók hesa annars so snotuligu og vísti tað seg so væl skrivaðu bók fram ,fall tað mær fyri bróstið teir í mínum føri í so smáu og bleiku stavirnar umframt restandi innihaldsyvirlit og leitiorðskrá, síðani eg fyri tað nógva brúki fakbøkur at sláa upp í, men ikki bilar, síðani bókin er kronologiskt skipað og so fangandi lestur, at ein illa fær slept bókini fyrr enn aftaná síðsta stav.

Faktuellar villur havi eg ikki funnið, tó eg ivist eitt sindur um málið um yvirtøkuna av donsku andveikraverndini, síðani eg øminnist um, at Karin Kjølbro vegna Tjóðveldisflokkin legði slíkt uppskot fram á Løgtingi langt áðrenn Javni fór at strevast fyri tí málinum.

Og so ørkymlar tað helst onnur enn meg, at Karin so ofta og konsekvent verður nevnd Joensen og ikki Kjølbro, sum vit annars kenna og ímynda okkum hana bæði í politikki og í sínum stóra arbeiði fyri menningartarnaðum og ikki minst Javna; men bókin er fyri tað nógva skrivað út frá keldutilfari, og Karin var um tað mundið altso gift Joensen.

Bókin um Janu er sum neyðug almenn kunning eisini væl skikkað til brúks í øllum skúlaskapi líka frá framhaldsdeild til yrkisútbúgvingar innan skúlaskap, heilsurøkt og forsorg.

Men ikki minst er bókin viðkomandi fyri avvarðandi til brekað børn umframt okkum mongu onnur, sum í okkara fáfongd hildu evnið vera okkum óviðkomandi og kanska eisini sluppu undan.

Brekað fólk og teirra avvarðandi eru partur av samfelagnum og hava samhaldsfesti frá øðrum so søtliga uppiborið.

Og allarmest vænti eg bókina um Janu kunna veita teimum í Javna stimbur og áræði til nú og framyvir at bera førningin enn longur fram á leið.

Eg vænti og vóni, at bókin um Janu verður væl fagnað, nógv lisin og verður við til at kveikja vaksandi samhaldsfesti í okkum mongu, sum góðvarin bara taka tað sum eina sjálvfylgju at sleppa snikkaleys gjøgnum lívið.

P.S. Javni er sum vøkstur lágur, krýpur fram við og hevur lyndi at fjala seg, so vit mugu níga niður at fáa eyga á hann og tann vónríka ljósagrøna litin.

Í okkara urtagarði er gróðursettur ein føroyskur pílur. Hann hevur ment seg líkt vøkstrinum Javna og hóast nógva fjálgan ikki nær námind øðrum javngomlum runnum nærhendis, men eg vildi treyðugt verið hann fyri uttan, og tað er ikki frítt fyri, at tann so følni pílurin minnir meg á Janu hjá Helenu, Hanusi og Óla.



- *Bókin um Janu er sum neyðug almenn kunning eisini væl skikkað til brúks í øllum skúlaskapi líka frá framhaldsdeild til yrkisútbúgvingar innan skúlaskap, heilsurøkt og forsorg, heldur Eyðun Joensen*

